


# SIGMUND og GRETHA mistu teirra einasta son

**Ein ætt sum er rættuliga væl umboðað í gamla kirkjugarði er Argeættin. Upprunin til hana er Andrass Mortansson, sum bygdi Argir. Hansara fjórði sonur var Niels Lassen Arge. Yngsti sonur Niels var Sigmund Zacharias Arge.**


ÓLI JACOBSEN
olij@sosialurin.fo

Sigmund var giftur við Onnu Margrethu Fredrikku Andreassen úr húsinum yviri í Dali við Kongabrúnna. Hon var dóttir skræddaran Andreas Andreassen úr Norðradali og Onnu Elisabeth Johannesdóttir úr Skopun. Tveir beiggjar hennara vóru Poli og Jens í Dali.

Sigmund var jarnsmiður sum pápin. Hann fór sum ungur út at sigla við skipinum Frederiksvaag, sum gamli Restorff átti og sonur hansara Johan førdi.

Sjálvur hevði hann lært smiðjakynstrið av pápanum. Tá ið hann helt uppat at sigla, fór Sigmund at arbeiða á verkstaði í Keypmannahavn, har hann var nøkur ár.

Tá ið mamman doyði í 1892 bað pápin Sigmund um at koma heim fyri at yvirtaka húsarhaldið og smiðjuna.

Sigmund og Margretha komu so heim við Lauru. Margretha hevði tá verið niðri í fýra ár, har hon hevði verið í ymiskum plássum. Millum annað hevði hon verið á Grundtvigs fólkaháskúla í Marienlyst. Hon hevði tænt hjá hattamanninum Ludvig Pahl og hildið hús hjá sjónleikarkvinnuni Juliu Scheker.

Tey giftust 7. desember 1892.

Fyrstu tíðina búðu tey hjá pápanum á Argjum. Her var nógv at takast við. Millum annað skuldi berast døgurði hvønn dag til teirra, sum arbeiddu í smiðjuni í Grind. Umframt Niels, pápin, Jóhan, beiggin, og Sigmund mundu eisini vera lærudreingir, og vóru teir av bygd, búðu teir hjá lærumeistaranum.

Men tá ið pápin doyði, vildi Sigmund flyta til Havnar. Hann keypti grundstykki av Konradbø. Tá ið útgrivið var, vísti tað seg, at so mikið av gróti var á stykkinum, at eini hús vóru bygd burtur úr. Hetta var í 1902. Hesi snøggu gróthúsini í Dr. Jacobsensgøtu 23 standa enn sum eitt minni um Sigmund og hansara hegni.



*HER HVILER VOR ENESTE SØN OG BRODER ANDREAS ARGE F 1894 D. 1916 EN TING HAR JEG BEGÆRET AF HERREN. JEG VIL SØGE EFTER, AT JEG MAA BO I HERRENS HUS ALLE MINE LEVEDAGE, THI HAN SKAL GEMME MIG I SIN HYTTE PAA DEN ONDE DAG*

*Á plátuni stendur: SIGMUND Z ARGE 1870-1941 ANNA MARGRETHE ARGE F. ANDREASSEN 1868-1941*



*Sigmund og Gretha við øllum børnunum. Aftast f.v.: Bette (1897), Sigmund, Ninna (1899), Dia (1894), og Mia (1893). Miðraðið: Lilla (1896), Frida (1902), Signa (1907), Gretha, Liffa (1904). Fremst Elsa (1900).*



*Andrias sum druknaði 23 ára gamal*

## Smiðjan

Tveir eldar vóru í smiðjuni. Jóhan blásti bjølginum til tann innara eldin, har Sigmund stóð við amboltin innanfyri við eini lítlari sleggju, meðan ein ella tveir menn stóðu uttan fyri amboltin og slerdu við stórum sleggjum. Tá ið jarnið var passaliga reytt, var tað tikið úr eldinum, og tá kundi smiðurin evna tað til knívar, hakar, torvskerar, spakar, líggjar og annað.

Í smiðjuni var nógv at takast við, millum annað var nógv at gera við skipini.

Tá ið roykur sást suðuri í fjørðinum varð hugt eftir, um hann mundi koma av trolara, tí so mátti Sigmund fáa boð í skundi um, at eitt far var á veg inn á Havnina. Tað ráddi um at vera fyrstur umborð, tí stór kapping var millum smiðurnar.

Eitt av hesum skipum var ein bátur úr Tróndheimi, har øll brúgvin var farin, og varð hetta afturgjørt av smiðjuni hjá Sigmundi. Eitt annað stórarbeiði var umbyggingin av línubátinum Grani, ið Christian Evensen hevði keypt frá Mortensen á Tvøroyri í 1915. Her var næstan alt gjørt av nýggjum.

Í 1912 var vaksið um smiðjuna við einum tilbygningi í tveimum hæddum. Tann niðara hæddin varð nýtt til verkstað fyri tey fínari amboðini. Hetta eru húsini sum í dag eru Bøgøta 1, beint yvirav smiðjuni í Lítluvík.

Sigmundur var góður smiður og samvitskufullur meistari. Honum dámdi ikki, at menn sum høvdu lært hjá honum, skuldu noyðast at fara at læra umaftur, tá ið teir komu niður at lesa til maskinmeistara. Hann arbeiddi tí fyri at fáa smiðju sína viðurkenda av statinum, so hann kundi lata lærubræv, tá ið lærutíðin var úti. Smiðjan hjá Sigmundi varð tískil tann fyrsta í Føroyum, sum fekk hesa statsviðurkenning.

Sigmund for undir at virka fyri grótídnaði, tá ið beiggin Jákup Andreas var vorðin gamal og ikki orkaði longur. Grótvirkið var stovnað í 1929. Sigmund gekk eisini heitt inn fyri hesum tiltaki, sum hann vónaði kundi vera til frama fyri land og fólk. Tað varð nógv arbeiði gjørt fyri fáa í lag útflutning av gróti til Danmarkar, og tá hetta langt um leingi tyktist at kunna bera til, brast annar heimsbardagi á.

## Dyggi smeiturin

Sigmund og Gretha fingu dyggan smeit, tá ið tey mistu teirra einasta son. Andreas druknaði 23 ára gamal í 1918 á Trongisvágsfirði. Hann var farin á fjørðin við einum seglbáti, men hann kollsigldi. Nú var eingin at taka smiðjuna eftir hann.

Sigmund andaðist 10. juni 1941, 72 ára gamal. Margretha doyði 74 ára gomul tann 12. februar sama ár. Tey bæði áttu átta døtur umframt Andrias. Døturnar gjørdust kendar sum konubrot.

## Eisini hjartarúm

Tey bæði fingu eisini prógvað, at har tað er hjartarúm er eisini húsrúm. Í 1914 kom systkinabarn Grethu, Jens Fredrik Jensen, heim úr Íslandi. Kona hansara var deyð frá níggju børnum, og nú kom hann heim við nøkrum av børnunum at fáa tey "avsett" til sína ætt. Tveir synir, Óskar og Napoleon, komu í fyrsta umfari at búgva hjá teimum. Oskar flutti nokk so skjótt til Tummas Askham, men Napoleon var verandi sum ein sonur í húsinum. Oskar livir enn í Íslandi 101 ára gamal.

Sigmund og Gretha vórðu jarðað í gamla kirkjugarði saman við soninum Dia.

*Keldur:*
*Argjamenn eftir Niels J Arge*
*FF-blaðið*

**Næstu ferð**

Komandi frásøgn verður um Elsebeth Anthoniussen, vanliga kalla Ebba. Hon var alt lívið álitið í húsinum hjá son gamla Restorff, Andreas William og konu hansara Helenu.



*Sigmund og brøðurnir laðaðu hesi húsini við Dr. Jacobsensgøtu fyrst í farnu øld. Teir laðaðu eitt umfar um dagin.*



*Smiðjan sum Niels L Arge bygdi í 1884 er til vinstru á myndini við flagtaki. Sigmund bygdi seinni uppí hesa smiðju.*